# Maldini spottaður

Sunnukvøldið skuldi 40 ára gamli Paolo Maldini í øllum góðum takka fyri seg á San Siro leikvøllinum í Milano. Men tað gekk ikki heilt eftir ætlan, tí í einum umráði av áskoðaraplássunum fekk hann háð og spott frá Milan-fjepparum. »Takk, skiparin. Tú vart ein meistari á vøllinum, men tú virdi ikki tey, sum gjørdu teg ríkan,« stóð á einum stórum bannara.



# Mourinho ongan veg

José Mourinho hevur steðgað øllum gitingum um, at hann skal vera á veg til annað felag, tí nú hevur hann longt sáttmála sín við Inter fram til á sumri 2012. Tað hevur annars ljóðað, at 46 ára gamli portugisin skuldi vera á veg til Real Madrid. Lønin til Mourinho hesi komandi árini skal vera tilsamans 220 milliónir krónur.

var tað Robson, ið stóð eftir sum stóra hetjan. Stórliga fagnaður av einum samlaðum Stretford End, ið als ikki vildi lata spælaran fara av vøllinum.

### Hughes prógvaði mistakið

Næsta uppgerðin millum risarnar var eisini í Cup Winners-kappingini. Hesa ferð finalan í 1991.

Tann nú rutineraði Bryan Robson var framvegis partur av liðnum hjá United, meðan Maradona fyri langari tíð síðani var farin úr Barcelona.

Fyrst og fremst snúi prátið undan dystinum seg tó um Mark Hughes, sum eftir eitt miseydnað uppihald í Barcelona nú var aftur í Manchester United.

Og tá dysturin var av, stóð Sparky eisini í sentrum. Stútarin frá Bruce eftir 67 minuttum hevði helst undir øllum umstøðum farið í netið, men waliski framherjin setti kortini fótin á. Avgerandi málið átti hann tó við húð og hár. Í oysandi regninum trekti hann framvið Carles Busquets í Barca-málinum, og úr einum mest sum ógjørligum vinkli bankaði hann við ristini bóltin í handara síðunet.

Tað brendi á móti dystarenda, tá hartskjórandi Barcelona-sweeparin, Ronald Koeman – sum varð mansvardur av Brian McClair! – móti dystarenda minkaði munin til 2-1. Seinni mátti Clayton Blackmore á akrobatiskan hátt ruddað bóltin av málstrikuni, men United helt fast, og so hevði Alex Ferguson vunnið sítt fyrsta europiska steyp við Manchester United.

### Dýr útlendingaregla

Í 1994/95 vóru Manchester United og Barcelona í sama bólki í Champions League bólkaspælinum. Men talan gjørdist ikki veruliga um tær klassisku uppgerðirnar, sum áskoðararnir høvdu vónir um.

Hetta komst fyrst og fremst av broyttu UEFA-reglunum um nýtslu av útlendingum. Nú taldu skotar, walisar, írar og norðurírar eisini sum útlendingar hjá enskum feløgum, og tað noyddi Alex Ferguson at hugsa alternativt, tá liðið skuldi setast til europisku uppgerðirnar.

Á Old Trafford gjørdist talan tó um undirhaldandi 2-2 javnleik. Hughes legði vertirnar á odda, men Romario og Bakero skutu Barca upp á 2-1, áðrenn Lee Sharpe javnaði við einum frekum hælsparki.

Á Camp Nou var tó eingin ivi um, at tað var Johan Cruyff, sum átti sítt egna Dream-Team. Ein av avgerðunum hjá Ferguson var at ofra Peter Schmeichel í útlendingakabalini, og hann kundi hjálparsleysur hyggja at, meðan Stoichkov (2), Romario og Ferrer bankaðu fýra kassar inn um Gary Walsh, sum saman við restini av United-verjuni so ruddiliga varð úrlætin í catalanska høvuðsstaðnum.

### Dreymabóltur og 12 mál

Í 1998/99 vóru Barca og United saman við Bayern München partur av sannari dynamitt-pulju í bólkaspælinum í Champions League. Somikið sterkur var bólkurin, at bæði Manchester United og Bayern München at enda stóðu í finaluni, men áðrenn Barcelona var úti úr kappingini, var liðið partur av tveimum ógloymandi uppgerðum móti komandi europisku meistarunum úr United.

Giggs, Sholes og Beckham løgdu United á odda tríggjar ferðir í heimadystinum, men hvørja ferð javnaði Barcelona. Og seinastu løtuna trýstu gestirnir fyri sigrinum, eftir at Nicky Butt varð rikin av vølli.

Tveir mánaðir seinni var talan um enn betri undirhald. Dwight Yorke og Andy Cole høvdu ment eitt mest sum telepatiskt samskifti, og ikki minst 2-1 málið hjá Cole var framúrskarandi dømi um hetta.

Men í Rivaldo hevði Barcelona ein spælara, sum veruliga var í heimsflokki. Og við einum beinleiðis frísparki og einum framúrskarandi saksasparki var hann høvuðsmaðurin hjá heimaliðnum. Og var tvørtræið yvir Peter Schmeichel plaserað bara tríggjar sentimetrar hægri, hevði brasilumaðurin skotið hattrick.

Barcelona hevði verið víðari úr bólkaspælinum og Champions League søgan hevði sæð øðrvísi út.

### Ginger slapp í finaluna

Higartil seinasta uppgerðin millum tey bæði mótstøðuliðini í Rom var í hálvfinalunum í Champions League.

Her gjørdist talan ikki um somu málveitslu, men á Camp Nou var talan um mest sum fullkomnan dominans frá heimaliðnum, sum tó ikki megnaði at skora.

Tað hevði Ronaldo hinvegin møguleika fyri eftir bara trimum minuttum í returdystinum á Old Trafford, men hann misnýtti møguleikan, sum hann fekk úr 11 metrum. Ístaðin mátti United seta álitið á roynda Paul Scholes, sum hølvaði eitt langskot upp í málhornið, soleiðis at hann eisini slapp at royna seg í finaluni, sum hann ikki varð partur av í 1999, tá hann hevði leikbann.




*Í annaðkvøld verður annar teirra fegin og hin keddur: Lionel Messi og Michael Carrick úr ávikavist FC Barcelona og Manchester United*

## Vinnarar 1956-2008

| | |
|---|---|
| 1956 | Real Madrid |
| 1957 | Real Madrid |
| 1958 | Real Madrid |
| 1959 | Real Madrid |
| 1960 | Real Madrid |
| 1961 | Benfica |
| 1962 | Benfica |
| 1963 | AC Milan |
| 1964 | Inter |
| 1965 | Inter |
| 1966 | Real Madrid |
| 1967 | Celtic |
| 1968 | Manchester United |
| 1969 | AC Milan |
| 1970 | Feyenoord |
| 1971 | Ajax Amsterdam |
| 1972 | Ajax Amsterdam |
| 1973 | Ajax Amsterdam |
| 1974 | Bayern München |
| 1975 | Bayern München |
| 1976 | Bayern München |
| 1977 | Liverpool |
| 1978 | Liverpool |
| 1979 | Nottingham Forest |
| 1980 | Nottingham Forest |
| 1981 | Liverpool |
| 1982 | Aston Villa |
| 1983 | Hamburg SV |
| 1984 | Liverpool |
| 1985 | Juventus |
| 1986 | Steaua Bucarest |
| 1987 | FC Porto |
| 1988 | PSV Eindhoven |
| 1989 | AC Milan |
| 1990 | AC Milan |
| 1991 | Reyða Stjørna Beograd |
| 1992 | FC Barcelona |
| 1993 | Olympique Marseille |
| 1994 | AC Milan |
| 1995 | Ajax Amsterdam |
| 1996 | Juventus |
| 1997 | Borussia Dortmund |
| 1998 | Real Madrid |
| 1999 | Manchester United |
| 2000 | Real Madrid |
| 2001 | Bayern München |
| 2002 | Real Madrid |
| 2003 | AC Milan |
| 2004 | FC Porto |
| 2005 | Liverpool |
| 2006 | FC Barcelona |
| 2007 | AC Milan |
| 2008 | Manchester United |